**Fiskimálaráðið**

Dagfesting: 15. september 2020
Mál nr.: 20/00303-6
Málsviðgjørt:

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| - | Í § 5 verður sum nýtt stk. 3 sett:<br>"*Stk. 3.* Fyri fiskifar minni enn 15 tons kann landsstýrismaðurin í kunngerð seta treytir fyri sjálvt fiskifarið, fyri at fáa fiskiloyvi." |
| § 7. Veiðiloyvið er galdandi til 1. januar 2032. Tá veiðiloyvið fer úr gildi, fara øll veiðirættindi samstundis úr gildi.<br>*Stk. 2.* Rætturin til fiskiloyvi í bólki 5 og rætturin til onnur fiskiloyvi hjá fiskifari í hesum bólki er galdandi til 1. januar 2032. | Í § 7, stk. 1 og 2 verður "2032" broytt til: "2033". |
| - | Í § 13, stk. 1, nr. 1-5, § 21, stk. 1 og 3, § 22, stk. 3, § 28, stk. 2 og 3, § 30, stk. 1, § 32, stk. 1, 2 og 4, § 33, § 36, stk. 1, § 42, § 49, stk. 5 og 6, § 50, stk. 1 og 4 verður "§ 19" broytt til: "§ 18". |
| § 18. Fiskidagaskipan og fiskidagatal verður ásett fyri botnfiskaveiðu í føroyskum sjógvi frá 1. januar 2020 til 31. desember 2020 fyri fiskifør undir føroyskum flaggi.<br>*Stk. 2.* Rættindi at fiska í fiskidagaskipanini, sambært stk. 1, verða latin teimum, sum í 2019, og tá lógin fær gildi, hava rætt til fiskidagar. Rættindi at fiska vera latin í fiskiloyvi samsvarandi ásetingum og mannagongd í § 8 og undir treytunum í §§ 19 og 21. | § 18, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:<br>"Frá og við 2021 ásetir landsstýrismaðurin við kunngerð fiskidagatal fyri hvørt fiskiár fyri hesar bólkar av fiskiførum undir føroyskum flaggi í botnfiskaveiðu í føroyskum sjógvi, tó Føroyabanki undantikin:<br>1) Bólkur 2: Trolarar 501-3000 HK:<br>a) Innara fiskidagaleið.<br>b) Ytra fiskidagaleið.<br>2) Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons |

| | |
|---|---|
| | 3) Bólkur 4: Útróðrarbátar 15-110 tons á veiðu við línu.<br>4) Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons og framtøku minni enn 500 HK á veiðu við troli.<br>5) Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á veiðu við húki."<br>*Stk. 2.* Rætturin til fiskidagar sambært stk. 1 , nr. 1-5 verður latin teimum, sum í 2019 høvdu henda rætt, ella teimum, sum hesin rættur seinni er fluttur til." |
| § 18, stk. 3. Tá landsstýrismaðurin frá og við 2021 ásetir fiskidagatalið í kunngerð, skal hetta gerast eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu, sum seta meginreglur um burðardygga stovnsrøkt og fyrisitingarligar mannagongdir um ráðgeving o.tíl. | Í § 18, stk. 3, verður "frá og við 2021" strikað. |
| - | Í § 19, stk. 1, nr. 6, sum verður § 18, stk. 1, nr. 5, verður sum 2. pkt. sett: "Undantiknir eru bátar undir 15 tons, sum eru undir skipan við heimild í § 22, stk. 4." |
| § 19. Innan fyri hvønn av hesum bólkum av fiskiførum verður fiskidagatal í 2020 ásett soleiðis:<br>1) Bólkur 2: Trolarar 501-3000 HK:<br>a) Innara fiskidagaleið: 4.386 fiskidagar.<br>b) Ytra fiskidagaleið: 1.530 fiskidagar.<br>2) Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons: 2.208 fiskidagar.<br>3) Bólkur 4 A: Útróðrarbátar 15-40 tons á veiðu við línu: 861 fiskidagar.<br>4) Bólkur 4 B: Útróðrarbátar 40-110 tons á veiðu við línu: 1.564 fiskidagar.<br>5) Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons og framtøku minni enn 500 HK á veiðu við troli: 1.584 fiskidagar.<br>6) Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á veiðu við húki 8.879 fiskidagar, umframt 2.150 fiskidagar markaðir til ikki fult riknar útróðrarbátar.<br>*Stk. 2.* Ásetta fiskidagatalið fyri hvønn bólk sær í stk. 1 er galdandi fyri fiskiskap á innaru fiskidagaleið, ásett í § 20, tó undantikið fiskidagar, ásettir fyri ytru fiskidagaleið í bólki 2, sambært stk. 1. Ásetta fiskidagatalið fyri bólk 2 á ytru fiskidagaleið kann bert nýtast til fiskiskap á ytru fiskidagaleið. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um | § 19 verður orðað soleiðis:<br><br>"**§ 19.** Landsstýrismaðurin ásetir í sambandi við fiskidagar, sambært § 18, stk.1, nærri reglur um fiskidagaleiðir, umbýti av døgum millum leiðir og veiðihættir, um at fiskidagar bert kunnu brúkast við fiskiførum av ávísari støðd ella ávísari framtøkumegi, at fiskidagar bert kunnu brúkast á ávísum leiðum, umframt reglur um flokking av fiskiførum, sum verða mátað upp av nýggjum.<br>*Stk. 2.* Fyri bólk 5, sambært stk.1, ásetir landsstýrismaðurin nærri treytir fyri at fáa fiskiloyvi, umframt reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar, hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann fyri hvønn bólk í hvørjum fiskiári seta fiskidagar av til at lata fiskiførum, sum avreiða livur og annan innvøl av fiski. Fiskidagatalið kann í mesta lagi vera 3% av samlaða fiskidagatalinum í hvørjum bólki, ásett við heimild í § 18, stk. 1. Landsstýrismaðurin ásetir treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum. |

| | |
|---|---|
| umbýti av fiskidøgum frá innaru til ytru fiskidagaleið. Verður fiskað á ytru fiskidagaleið, uttan fráboðan til Vørn um umbýti av døgum frammanundan, verða dagarnir roknaðir av fiskidagatalinum, tillutað til fiskiskap á innaru fiskidagaleið.<br>*Stk. 3.* Ásettu fiskidagarnir fyri hvønn bólk í stk. 1 kunnu bert nýtast til fiskiskap við fiskifari, ið er innan fyri avmarkingarnar fyri stødd ella framtøkumegi, ið eru ásettar fyri hvønn bólkin og við tí reiðskapi, ið er tilskilað fyri bólkin. Somuleiðis er treyt, at fiskidagarnir bert verða brúktir til fiskiskap á leiðum, har fiskifør við teimum tilskilaðu avmarkingunum fyri stødd ella framtøkumegi hava loyvi at royna.<br>*Stk. 4.* Fiskidagar, tillutaðir bólki 2, 3, 4 A, 4 B og 4 T sambært stk. 1, verða latnir sum egnir fiskidagar.<br>*Stk. 5.* Fiskidagar, tillutaðir bólki 5 sambært stk. 1, verða latnir sum felags fiskidagar. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir, og hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar útróðrarbátar.<br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann seta nærri reglur um, at fiskidagatalið, tillutað hvørjum fiskifari í bólki 4 A og 4 B, kann roknast um í lutfallinum 1:2, um fiskað verður við snellu.<br>*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann í 2020 fyri bólk 2, sambært stk. 1, tilluta 177 fiskidagar og fyri bólkarnar 3 og 4, sambært stk. 1, tilluta ávikavist 61 og 101 fiskidagar tilsamans at lata fiskiførum, sum avreiða livur. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum.<br>*Stk. 8.* Umframt fiskidagar sambært stk. 1 verða, fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2020 til 31. desember 2020, ásettir felags fiskidagar til hvønn av bólkunum í § 19, stk. 1, nr. 1-5, ið er javnt við talið av fiskidøgum, sum hvør bólkur sær ikki brúkti í fiskiárinum 2019.<br>*Stk. 9.* Fiskiførini í bólkunum í § 19, stk. 1, nr. 1-5 kunnu eftir 1. oktober 2020 brúka av fiskidøgunum sambært stk. 8, tá | *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fiskidagar, sum hvør bólkur, sambært § 19, stk. 1, nr. 1-4, ikki hevur brúkt í fiskiárinum, kunnu flytast til árið eftir, og verða tillutaðir sum felags fiskidagar fyri hvønn bólkin at brúka í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 31. desember. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum.” |

| | |
|---|---|
| fiskidagarnir, tillutaðir fiskifarinum í fiskiloyvinum, eru brúktir.<br>*Stk. 10.* Fiskidagar, ið verða avhendir sambært § 30, stk. 1, verða ikki roknaðir sum brúktir fiskidagar, sambært stk. 9 í hesi grein, uttan so at í minsta lagi sama dagatal er móttikið, sambært § 30, stk. 1, og brúkt.<br>*Stk. 11.* Fiskifar, í bólkunum sambært stk. 1, verður verandi í tí bólki, tað er í, og kann ikki flyta bólk, hóast tað verður mált upp av nýggjum, ella broytingar verða gjørdar, sum ávirka stødd ella framtøkumegi.<br>*Stk. 12.* Fiskifar, sum fyri gildiskomu lógarinnar, hevur verið knýtt at fiskidøgum í ávísum bólki, men sum ikki lýkur treytina um avmarking í stødd ella framtøkumegi í stk. 1, kann halda fram í hesum bólki, tá henda lógin fær gildi.<br>*Stk. 13.* Fiskidagar, sum sambært § 77, stk. 3 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, eru avhendir ella fluttir frá bólkunum 4 A ella 4 B til bólk 3 í 2019, kunnu í 2020 avhendast endaliga til rættindahavara í bólki 3. Treyt er, at Vørn hevur váttað, at flytingin kann fremjast. | |
| § 20. Innara fiskidagaleiðin er sjógvurin innan fyri beinar linjur, drignar gjøgnum hesi støð í hesi raðfylgju:<br>1) 62°47'00"N, 07°12'00"W.<br>2) 62°47'30"N, 06°30'00"W.<br>3) 62°42'00"N, 06°00'00"W.<br>4) 62°28'00"N, 05°00'00"W.<br>5) 62°00'00"N, 04°30'00"W.<br>6) 61°30'00"N, 04°50'00"W.<br>7) 61°15'00"N, 05°00'00"W.<br>8) 61°15'00"N, 06°00'00"W.<br>9) 60°35'00"N, 06°09'00"W.<br>10) 60°26'00"N, 06°10'00"W.<br>11) 60°26'00"N, 06°32'00"W.<br>12) 60°35'00"N, 06°35'00"W.<br>13) 61°23'00"N, 07°30'00"W.<br>14) 61°25'25"N, 08°01'00"W.<br>15) 61°32'48"N, 08°20'30"W.<br>16) 61°49'00"N, 08°41'48"W.<br>17) 62°18'00"N, 08°45'00"W.<br>18) 62°38'00"N, 08°03'00"W.<br>19) 62°47'00"N, 07°12'00"W.<br>*Stk. 2.* Ytra fiskidagaleiðin er sjógvurin millum 200 fjórðinga føroyska fiskimarkið og innaru fiskidagaleiðina, ásett í stk. 1, tó | Yvirskriftin yvir § 20 og § 20 verða strikað. |

| | |
|---|---|
| verður Føroyabanki ikki tikin við. | |
| **§ 22.** Fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi, undantikin fiskiskapur skipaður sambært §§ 18 og 19, kann landsstýrismaðurin áseta kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðra skipan og nærri reglur um atgongd, býti av tøkum fiskimøguleikum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram. | Í § 22, stk. 1 verður "sambært §§ 18 og 19" broytt til: "sambært § 18, samanber tó stk. 4". |
| | Í § 22 verður sum stk. 4 sett:<br>"*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um at skipa fiskiskap við opnum, føroyskt bygdum, bátum í bólki fyri seg uttan fyri fiskidagaskipanina, sambært § 18, stk. 1, nr. 5, og ásetir nærri reglur og mannagongdir um atgongd, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram." |
| § 28, stk. 2. Treyt fyri at loyva flyting av veiðiloyvum hjá fiskiførum í bólkunum sambært § 19, stk. 1 og fiskiførum, sum fiska botnfisk í føroyskum sjógvi sambært reglum ásettum við heimild í § 22 er, at fiskiorkan ikki økist. | § 28, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Veiðiloyvið hjá fiskifari í bólki sambært § 19, stk. 1 og hjá fiskifari, sum hevur rættindi í fiskiskapi eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, skipaður við heimild í § 22, undantikin fiskiskapur, ið er skipaður við mest loyvdu veiðu og egnum árskvotum, kann bert flytast, um fiskiorkan ikki økist." |
| § 28, stk. 5. Skiftir fiskifar við veiðiloyvi eigara, fylgir veiðiloyvið fiskifarinum, um nýggjur eigari av fiskifarinum lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi í hesi løgtingslóg. | § 28, stk. 5 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 5.* Skiftir fiskifar við veiðiloyvi eigara, kann veiðiloyvið fylgja fiskifarinum, um nýggi eigarin av fiskifarinum lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi í hesi løgtingslóg." |
| § 31. Egin kvotupartur og egin árskvota kunnu avhendast øðrum fiskifari undir føroyskum flaggi við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Undantiknar eru egnar árskvotur hjá fiskiførum undir 15 tons ella fiskiskapur, ið er skipaður við heimild í § 22. | Í § 31, stk. 1, 2. pkt. verður: "ella fiskiskapur, ið er skipaður við heimild í § 22" strikað. |
| § 32, stk. 3. Skiftir bátur við fiskiloyvi eigara, fylgir fiskiloyvið bátinum, um nýggi eigarin lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap sambært løgtingslógini. | § 32, stk. 3 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 3.* Skiftir fiskifar við fiskiloyvi eigara, kann fiskiloyvið fylgja við fiskifarinum um nýggi eigarin lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap sambært hesi løgtingslóg". |
| § 64. Er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, ið:<br>1) brýtur § 3, stk. 3, § 4, stk. 1, § 5, stk. 2, § 8, stk. 3, 3. pkt., §§ 11-12, § 13, stk. 1, 5 og 7, § 19, stk. 2, 2. og 4. pkt, og stk. 3, § 21 | Í § 64, stk. 1, nr. 1 verður aftan á § 35, stk. 1, 1. og 2. pkt., sett: "§ 35, stk. 3, 2. pkt.," og "§ 19, stk. 2, 2. pkt. og 4. pkt. og stk. 3" verður strikað, og "§ 22, stk. 1 og 2" verður broytt til: "§ 22, stk. 1, 2 og 4". |

| | |
|---|---|
| stk. 1 og 3, § 23, stk. 4-6, § 25, stk. 1 og 3, § 26, stk. 1, § 27, stk. 1, § 30, stk. 1-2, § 31, stk. 1-2, § 35, stk. 1, 1. og 2. pkt., § 37, stk. 1, § 38, stk. 1, § 39, stk. 1, § 43, stk. 1, § 46, stk. 1 og 2, § 49, stk. 8, § 55, stk. 1, § 56, stk. 1 og 2, § 57, stk. 1 og § 61, | |
| **§ 64,** *stk. 2.* Í reglum, ásettar við heimild í § 9, stk. 4, § 19, stk. 2, 3. pkt., stk. 5, 2. pkt, stk. 6 og stk. 7, 2. pkt., § 21, stk. 2, § 22, stk. 1 og 2, § 23, stk. 1, § 25, stk. 4, § 26, stk. 2, § 27, stk. 2, § 28, stk. 4, § 29, stk. 6, § 30, stk. 4, § 31, stk. 4, § 32, stk. 5, § 33, § 34, § 35, stk. 2, § 37, stk. 3, § 38, stk. 3, § 39, stk. 2, § 40, § 41, stk. 2 og 6, § 42, § 46, stk. 3, § 49, stk. 10, § 50, stk. 6, § 52, stk. 1 og 2, § 55, stk. 2, § 56, stk. 3, § 71, 2. pkt., kunnu verða ásettar reglur um sekt. | Í § 64, stk. 2 verður aftan á “við heimild í” sett: “§ 5, stk. 3” og “§ 19, stk. 2, 3. pkt., stk. 5, 2. pkt, stk. 6 og stk. 7, 2. pkt.” verður broytt til: “§ 19, stk. 1-3”, og “§ 35, stk. 2” verður broytt til: “§ 35, stk. 2 og 3”. |